# Trummuskeið í Havn

Mánadagin 8. desember og alla vikuna á tamp verða allar trummur tiknar fram í mentanargøtuni Tórsgøtu í Havn. Tá fer Kvøldskúlin at skipa fyri trummuspæli á altjóða støði í Margarinfabrikkini og Reinsarínum. Lærari í trummuspæli verður Gulli Briem, ið er kendur trummuleikari í íslendska fusjónsbólkinum Mezzoforte. Øll eru vælkomin og undirvíst verður bæði við einstaklingum og í bólki. Tekning á telefon 227700, kostnaður 500 krónur. Nærri upplýsingar um Gulla Briem eru á heimasíðunum www.gullibriem.com ella www.mezzoforte.com, sigur heimasíðan hjá Tórshavnar Kommunu.




# Veðurlagsráðstevna 15. desember 2008

15. desember 2008 skipar Innlendismálaráðið fyri allmennar ráðstevnu á Hotel Føroyum um tiltøk at minka um føroyska CO2-útlátið. "Skjótt syftir seiðir og tunga takið" er heitið á frágreiðing, sum veðurlagsbólkurin undir landsstýrinum hevur latið úr hondum. Frágreiðingin lýsir uppskot til virkisætlan og tiltøk at minka um føroyska CO2-útlátið. Á ráðstevnuni fara politikarar, embætisfólk og fólk úr vinnulívinum at røða um evnið og seinnapartin verður tikið samanum. Ráðstevnan er allmenn og neyðugt er við tilmelding á telefon 358094. Skráin er at síggja á www.imr.fo.



*Hátíðarhaldið í dag verður skipað soleiðis, at næmingar skúlans fara at hugna sær fyrrapartin. Klokkan 18 til 21 verður móttøka fyri øllum, sum hava ella hava havt samband við skúlan. Byrjað verður í fimleikahøllini klokkan 18:00 við felagssangi, røðum og framførslum, har øll eru vælkomin*

***Keldur:***
*Sankta Frans Skúli v. Erhard Jacobsen*

*Havnin, fólk og yrki v. Birgar Johannesen*

*www.skulin.fo*

# Nonnuskúlin 75 ár

**Í dag eru 75 ár liðin síðan Sankta Frans Skúli í Havn bleiv vígdur. Fyrstu franciskanara-systrarnar komu til Havnar í 1931, og byrjaðu tær skúla í húsunum hjá Klett í Bringsnagøtu**

SKÚLI
*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*

Fyrstu franciskanarasystrarnar komu til Havnar við DFDS ferðamannaskipinum Dronning Alexandrine á kvøldið tann 24. apríl 1931. Tann nunnuskipan, sum franciskanarasystrarnar í Havn hoyra til, varð stovnað í 1876.

Í 1931 byrjaðu tær skúla í Bringsnagøtu í húsunum hjá Klett, næmingatalið lá um 25. Í 1932 stovnaðu tær ein barnagarð til umleið 20 børn. Sama ár keypa franciskanarasystrarnar saman við bispadøminum í Keypmannahavn økið niðan fyri Viðarlundina, og árið eftir varð farið undir at byggja skúla, kirkju, kleystur og barnagarð. Talan var um ein stóran bygning, sum H.C.W. Tórgarð arkitektur teknaði.

Síðan skúlin av fyrstan tíð varð tikin í nýtslu, er hann nakrar ferðir útbygdur, eins og skúlagarðurin eisini er víðkaður. Eitt nú kom fimleikahøll fyrrapartin í 60unum.

Kirkjuvígslan var 19. november 1933, og skúlin varð vígdur 8. desember sama ár. Umleið 60 fólk vóru samankomin, og katólski presturin Boekenoogen vígdi skúlan. Til vígsluna vóru millum onnur M.A. Jacobsen, borgarstjóri, Símun av Skarði, háskúlastjóri, Zachariassen, amtslækni og umboð fyri føroysku bløðini. Sankta Frans Skúli varð øll tey fyrstu árini og líka til 1952 rikin sum privatskúli, uttan almennan stuðul. Fyrstu mongu árini undirvístu systrarnar, men so við og við komu aðrir lærarar.Í 1965 byrjaðu fransiskanarasystrarnar forskúla.

Fyrsti føroyski skúlastjórin var Bjarni Skaalum. Hann byrjaði sum lærari í skúlanum í 1967 og frá 1973-80 var hann varaskúlastjóri og skúlastjóri frá 1980-97. Áðrenn Bjarna Skaalum var systir Stinissen skúlastjóri.

Í 1985 var tíðin farin frá hesum sermerkta skúla. Nunnurnar handaðu skúlan til Tórshavnar Kommunu 1. apríl, tí tær ikki sóu seg førar fyri at halda fram. Systrarnar fingu nýggjan bústað og kirkju, sum liggur í grannalagnum av skúlanum. Í dag er eingin nunna eftir á skúlanum, men navnið hongur eftir.

Skúlin hevur bara havt grunddeild, og skúlastjóri í dag er Selmar Jacobsen, sum tók við í 1997.

Sosialurin ger meira burturúr hátíðarhaldinum seinni.



*Í bókini, Havnin, fólk og yrki, skrivar Birgar Johannesen soleiðis um Nonnuskúlan: Í apríl 1931 komu tvær franciskanasystrar til Føroya. Í august fluttu tær inn í húsini hjá Klett í Bringsnagøtu. Fólk fingu skjótt greiði á, hvørjar tær vóru, og fóru at søkja sær hjálp hjá teimum viðvíkjandi útbúgving og barnaansing. Innan árið var úti, høvdu tær sett á stovn fyrsta barnagarð í Føroyum og høvdu ábyrgd av 22 børnum. Í 1933 flutti barnagarðurin saman við Katólsku kirkjuni niðan í Villumslág, og í januar mánaði árið eftir varð katólski skúlin vígdur*